# Dagur og Vika ørkymlar hyggjaran

JOHN JOHANNESSEN
løgtingsmaður



**Hóast eg sjálvur og Javnaðarflokkurin gjøgnum fleiri ár hava mótmælt ólógligum fangaflutningi í føroyskum loftrúmi, so gav Dagur og Vika mánakvøldið júst øvugtu myndina. Slíkur tíðindaflutningur eigur ikki at verða góðtikin**

Kenni væl til strævnu arbeiðsviðurskiftini á redaktiónini hjá Degi og Viku. Tí vóni eg, at tað var strongd og ikki onnur motivir, ið lógu aftan fyri tíðindainnslagið í Degi og Viku mánakvøldið, har eg kendi meg stórliga misnýttan í ávísum politiskum spæli.

Dagur og Vika gav ta myndina, at eg sjálvur og Javnaðarflokkurin ongar trupulleikar hava av Irak krígnum og hernaðarligari flúgving í føroyskum loftrúmi yvirhøvur. Og so bleiv spurningurin um ólógligan fangaflutning vavdur inn í myndina. Lat meg gera tað heilt greitt. Eg sjálvur og harvið eisini Javnaðarflokkurin hava ferð eftir ferð mótmælt ólógligum fanglaflutningi í føroyskum loftrúmi, og vit hava eisini mótmælt Irak krígnum. Hesa støðuna standa vit framvegis við.

Landsstýrismaðurin í úttanríkismálum, sum ikki hevur stundir at vera við til at viðgera fíggjarlógina, keðir seg eftir øllum at døma so mikið nógv, at hann nú vil hava fjølmiðlarnar at seta dagsskránna fyri seg í einum máli, sum ikki er aktuelt í løtuni. Tí verður ein "ballón" send út, sum er ein samanvavstur av ymiskum málum. Hetta hevur hann loyvi til, men man má sum brúkari vænta, at fjølmiðlar er kritiskir og vaknir. Tað er Dagur og Vika ikki í hesum føri. Í staðin spennir hon seg fyri ein vogn við politiskari propagandu. Hvussu ber tað til dømis til, at man vil vera limur í Partnership for Peace, men samstundis vil venda NATO bakið? Her er abslolut ongin samanhangur.

Niðanfyri skal eg fyri ordans skuld viðleggja seinasta tilmæli, sum eg gjørdi í uttanlandsnevndini um hetta málið. Tað var 12. des. 2007. Síðani tá hevur ongin umbøn um flúgviloyvi verið í uttanlandsnevndini:

**12. des. 2007: Svar í sambandi við ráðførslu løgmans við uttanlandsnevndina um hernaðarligt flúgviloyv**

Altjóða mannarættindadagurin er júst farin aftur um, nú vit vitgera umbønina frá USA um hernaðarligt flúgviloyvi í føroyskum loftrúmi.

Eins og í sambandi við sama mál seinastu tvey árini er tað mín avgjørda hugsan, at Føroyar í svari sínum eiga at gera vart við, at vit á ongan hátt góðtaka loyniligan flutning av fangum gjøgnum føroyskt loftrúm við pínslu sum endamáli. Harnæst eigur landsstýrið at heita á donsku stjórnina um at fáa kannað og staðfest, hvørt loftrúmið yvir Føroyum verður brúkt til ólógligan flutning av fangum.

Av tí, at altjóða samfelagið bæði er við í uppbygginini av Irak og í altjóða stríðnum ímóti yvirgangi, eiga vit kortini ikki at sýta fyri at geva loyvi til hernaðarliga flúgving, ið uppfyllir hesi altjóða endamál. Í 2002 vildi Javnaðarflokkurin ikki geva sítt samtykki orsakað av, at ST ikki hevði góðkent álop á Irak. Í dag er støðan ein onnur, nú talan er um uppafturbygging av Irak, sum altjóða samfelagið er við í. Tískil eiga føroyskir myndugleikar ikki at seta seg ímóti, at flogið verður gjøgnum føroyskt loftrúm fyri at hjálpa irakska fólkinum og fyri at útinna aðrar uppgávur, ið eru góðkendar og samtyktar av altjóða samfelagnum.

Við hesum og við viðmerkingunum til sama mál seinastu tvey árini meti eg meg skilliga at hava gjørt mína støðu greiða í sambandi við hernaðarligt flúgviloyvi í føroyskum loftrúmi.

# Tjóðarfrælsið er ikki fremst í tykkara politisku verð...

PETER SPLIDT

Hvørjir eru hesir kosnu menn, sum við serloyvi frá okkara miðlum, fáa loyvi til at tilgykla okkum um teirra tilvildarliga frælsislyndi.

Alt ímeðan vit vinda merkið húnar hátt, og hesir í hesum róma sníkja seg inn í okkara hugaheim við verbalum pedagogiskum vendingum um frælsið, eitt frælsið sum einamest umfatar at kanna og nokta og gyrða seg inni, og sum verður umrøtt tá aðrar tjóðir og ella persónar nevna Føroyar.

Tað eru ógvusligir pengar brúktir fyrr, og tit eru longu byrjaðir aftur, men hesaferð verður tað neyvan so lætt. Tjóðarfrælsið er ikki fremst í tykkara politisku verð, hóast tit royna at vísa tað, tað hava vit sæð í áralangum sjónleiki, har veljarin í dýrum dómi skal ogna sær atgongumerkið til nakað, sum ongantíð verður annað enn ein sokallað "premiera" ella frumframførsla. Tveitið teoriirnar og nærkist nú verunleikanum, ikki halda okkum fyri gjøldur meir. Tá tit nú einaferð finna tað fyri gott og í skundi fáa ein fyrispurning, svarið við størri tygn, og ikki við einum følskum smíli.

At vit eiga at vita, hvat fer fram í okkara økjum og soleiðis eisini loftøki er sjálvsagt. Hoydal umtalar ólógligan flutning í "okkara luftøki " í degi og viku og ætlar at steðga hernaðarflutningi í sama loftøki, her kemur tað aftur tað noktandi og samstundis profilerandi. Hvør hevur fingið pengar fyri at umsita okkara luftøkið? Og hvussu stóran týdning hevur tjóðveldið í hesum høpi?

Nei hann átti heldur at latið ein ovurhond stóran flogvøll byggja í Føroyum við amerikanska dollaranum, nú teir eru farnir úr íslandi. Hesin guruin hjá tjóðveldisdroymarum og føroyskum navlarithøvundum, er nú rættiliga illa fyri, og dollarin er ein av grundunum til støðu íslendinga. Ikki bara virðisbrøv og lán i fremmandum gjaldoyra. So sum Euro.

Hetta átti hann at umhugsað, áðrenn hann sigur ov nógv og heldur upplyst føroysku tjóðina um manninum sum torir nevniliga Horowitch ella Blair.

Tað er ikki langt síðani, at hann svaraði einum tráspyrjandi donskum miðlamanni um viðurskifti í Miðeystri. Svarið varð soljóðandi:

"at meðan vit (amerikumenn) berjast fyri rættindum, orkukeldum og trúarfrælsi og ímóti terrorismu, syngja tit protestsangir og demonstrera, men tá vit fara úr miðeystri, er alt Europa í størri vanda, enn tit kunnu hugsa tykkum, tá liggja tit allir við reyvini í ein vissan kumpassrætning innan tit fáa snarað tykkum á. Hevur hann ikki rætt?

Hvat sigur tjóðveldishetjan tá. Enn liggur hann bert á knæ í fólkatinginum. Ivist ikki í, at hann er vælmeinandi, men tað er ikki nokk, nú má teoriin dvína eina stund.

Hvat segði Blair fyri fáum døgum síðani, uttan aldarlanga bardagan sum umfatar vápn verður einki vunnið av okkum í vesturheiminum, tað er burturvið at hugsa annað. Flestu fýggindar vesturheimsins vita, at ein endalangur dialogur hjá okkum er alfa og omega, teir vita hvat teir gera.

Hann hevur nú í nógv ár tosað um at eiga og tilogna sær nakað sum eru sjálvsøgd rættindi hjá tjóðini Føroyar, og sum eg ikki ivist í verður veruleiki, tá danska tjóðin hevur fingið nokk av hálvum sannindum og grenji og sigur "kom til bordet og í får det i ønsker men betal ved kasse et".

Hetta minnir meg ikki sørt um SEV kampagnu sum er í hesum døgum, har ein løntur fer út at siga føroyingum um, hvussu teir spara el. Tað er helst rætt, um tað er 3%, men sparir tú meir enn 30%, so skalt tú síggja hvussu skjótt kilowatt tímin kemur at kosta meir enn hann ger í dag.

Langt síðani skrivaði eg hesar linjur, og tær eru enn aktuellar:

**AKADEM.. POLIT. KO. MED HORN.**

Roynast her mær
kenslur bundnar
Í fríðum landi valda
villir hundar,
Tíðin ber sár eftir
skrivandi mentan
Meta seg sjálvar so
sera hentar.

Oyðsla burt álit frá
spyrjandi tjóð
Hvaðani fáa vit ráðini
góð.
Kosnir menn fylgja
bundnari rás,
Uttan at vita tað læstir í
lás.

Hollar royndir fyri
teoriini dvína,
Meðan teir sær sjálvum
samsýna.
Innilæst liggur
framkomin vitan,
Draga til sín tann
feitasta bitan.

Kjaftast frítt í øllum
miðlum
Ressast ei úr
dunnuhyljum.
Kámast burtur
fullveldisleið,
Nú hundadagakongur
niðarliga reið.

Um tilfeingið, olju og
blandan fisk
Heilsuskipan og
nýggjan hard diskl
Søgulig brygdi og
oljudans,
Hvør yndkir við
skútuni nýggjan tjans.

**Bless**

# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**22. partur**

Vit eru nú komin til teir sokallaðu smáu profetarnar. Lat okkum hyggja eitt sindur eftir, hvussu teir byrja sínar bøkur, og hvat tað er, teir profetera um. Er tað filosofi ella er tað boð frá Gudi.

**Orð Harrans, ið kom til Hoseas, son Be`eri, á døgum Uzziasar, Jótams o.s.fr., og annað vers sigur: Tá ið Harrin byrjaði at tala við Hoseas, segði Harrin við hann osf**.

Hvat talar Hoseas um? Júst tað sama, sum Esaias samtíðarmaður hansara, og Jeremias og Ezekiel tala um: Dóm yvir Ísrael og Juda fyri ólýdni og synd. Hann profeterar um, at fólkið skal fara í útlegd millum tjóðirnar, og hann talar um náðilyfti, og at tey skulu koma aftur. Hoseas profeterar ikki um heidningatjóðirnar, eins og hinir gera.

Hoseas livdi í tíðini beint frammanundan, at Ísraelsríki fall. Kanska upplivdi hann, at spádómar hansara gingu út.

Jóel profetur er næstur í bíbilskari rekkjufylgju.

Hendan bókin byrjar eisini soleiðis, at eingin kann vera í iva um, hvør er høvundurin. Tað er Gud. 1. kap. 1.vers ljóðar soleiðis: **Orð Harrans, ið kom til Jóel, son Petuel**.

Og tað, sum Jóel talar um, er tað sama sum hinir. Tað stendur einki um, nær hann hevur livað, men hann talar um stóra neyð, sum er í landinum, og biður fólkið rópa til Harran. Hann talar um "dag Harrans", sum er ein myrkur dagur, sum fleiri av hinum eisini nevna um. Hann talar náðilyfti til Ísrael og dóm yvir heidningatjóðirnar. Hann nevnir um spjaðingina út millum fólkasløgini og um dómin yvir heidningatjóðirnar, sum gjørdu hetta og býttu landið millum sín. Harrin skal døma tjóðirnar, men Juda og Jerúsalem verða búgvandi í allar ævir.

Síðani koma vit til Amos. Hann livdi um somu tíð, sum Esaias og Hoseas. Kanska hevur hann verið eitt sindur eldri enn teir. Hann sigur í 3. versi í 1. kapitli: So sigur Harrin. Og hetta endurtekur hann fleiri ferðír. Boðskapur hansara er tann sami, sum hjá hinum. Hann talar um dóm yvir Ísrael og Juda. Eisini um dóm yvir heidningatjóðirnar. Hann profeterar eisini um "Dag Harrans" og um komandi frelsu Ísraels.

So vit síggja, at hesir profetar profetera um tað, sum Andi Guds sigur við teir um tað ræðuligu vannlukku, sum skuldi koma yvir Ísrael fyrst og síðani yvir Juda eisini. Teir profetera um, at tey skulu koma heimaftur úr útlegdini , tað, sum vit nú uppliva og síggja fer fram. Teir profetera um dómin, sum skal koma yvir hinar tjóðirnar. Tað standa álvarsligar hendingar fyri framman. Ert tú til reiðar? "Ger teg til reiðar at møta Gudi tínum!" Sum Amos sigur í kap. 4,12.

**Framhald**